## Fíggjarlógin samtykt

Grønlendska Landstingið hevur samtykt fíggjarlógina fyri 2010. Lógin hevur 227 milliónir krónur í halli, men tað stavar frá einum láni, sum orkufelagið Nukissiorfiit hevur lænt úr landskassanum til vatnorkuútbyggingar. Hinvegin javnvigar fíggjarlógin, tá tað snýr seg um rakstur og íløgur. Bara tinglimirnir hjá samgonguni atkvøddu fyri fíggjarlógini, men andstøðan atkvøddi fyri nøkrum greinum og játtanum. Grønlendsku fjølmiðlarnir siga, at hóast fíggjarlógin ber brá av sparingum, hevur hon fleiri ábøtur á vælferðarøkinum.



## 980 fangar fyri ein

Í Ísrael hevur ríkisadvokaturin gjørt av, at stjórnin kann ganga við til at lata 980 palestinskar fangar sleppa úr ísraelskum fongslum í býti við ein ísraelskan hermann, sum hevur verið fangi hjá Hamas tey seinastu trý árini. Ísraelsmenn og palestinar hava tingast leingi um eitt fangabýti, og egyptiskir og týskir diplomatar hava virkað sum semingsmenn. Ísraelski hermaðurin, sum eitur Gilad Shalit, bleiv burturfluttur í 2006 og hevur verið í Gaza-geiranum síðani. Fyri tveimum mánaðum síðani almannakunngjørdi Hamas eitt sjónband. Har sást Gilad Shalit sita og lesa eitt blað, sum var dagfest tann 14. september, skrivar AP.

# m í kreppuni



*- Íløgufelagið Royndin setti í sínari tíð 3 miljónir krónur í verkætlanina við verksmiðjuskipinum Athenu hjá Thor í Hósvík, og tá parturin hjá íløgufelagnum seinni varð seldur, fekk LÍV heilar 16 miljónir krónur aftur, segði Tummas Eliasen á vinnutinginum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag*

og 10% í øðrum.

- Hann segði, at LÍV hevur møguleikan at seta meira pening í føroyskt vinnulív, og sum er fara umleið 2% av íløgunum til vinnulívsfígging.

Stjórin eftirlýsti í síni framløgu ein meira málrættaðan vinnulívspolitiskan karm í Føroyum.

- Vit kunnu taka sum dømi, at danir í sínari tíð søgdu seg vilja vera førandi innan framleiðslu av vindmyllum, og tað eru teir eisini í dag. Skulu vit røkka einum máli, má kósin setast, og so mugu vit stremba eftir málinum. Ein fyritreyt er, at vinnulívspolitisku karmarnir eru tryggir, legði hann aftrat.

### 23 verkætlanir

Hann segði, at íløgufelagið Royndin, sum LÍV eigur, í løtuni er við í tilsamans 23 verkætlanum.

- Saman við Eik hava vit eisini eitt fastognarfelag, sum eitt nú eigur SMS, Handilskjarnan og Hotel Vágar, segði hann.

Í síni framløgu vísti Tummas Eliasen á, at fleiri av íløgunum, sum pensjónstryggingarfelagið hevur gjørt í føroyskt vinnulív, hava givið góð avkast, og summar av íløgunum hava rindað seg aftur upp til fleiri ferðir. Sum dømi um góðar íløgur, nevndi stjórin í Lív eitt nú laksavirkir, supply-vinnu og føroyska vinnu í Kyrrahavinum.

Hann nevndi eisini, at felagið í sínari tíð setti 3 miljónir krónur í verkætlanina við verksmiðjuskipinum Athenu hjá Thor í Hósvík, og tá parturin hjá felagnum seinni varð seldur, fekk LÍV heilar 16 miljónir krónur aftur.

- Men tað eru eisini skipaíløgur, sum hava eydnast minni væl, legði hann aftrat.

Áðrenn vit sleppa teimum íløgum, sum LÍV hevur gjørt, kunnu vit leggja aftrat, at pensjónstryggingarfelagið eisini var við til at stovna føroyska virðisbrævamarknaðin, sum hevur verið ein góð íløga.

- Eitt pensjónstryggingarfelag eigur sjálvandi altíð at royna at tryggja sær, at íløgur eru tryggar, samstundis sum avkastið er størst møguligt, segði stjórin.

### Sveiggj í búskapi

Tummas Eliasen segði í síni framløgu á tinginum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag, at tá kreppan tók seg upp í Føroyum tíðliga í nítiárunum, hevði LÍV umleið 700 miljónir krónur í lánum úti hjá kommunum, men tíbetur spældi alt rímiliga væl av, og stórur partur av peninginum er komin aftur.

- Seinnu árini hava kommunurnar sum heild ikki havt lánstørv, legði hann aftrat.

Stjórin í LÍV segði, at ikki minst kreppan í Føroyum í nítiárunum lærdi pensjónstryggingarfelagið at spjaða váðan í størri mun enn frammanundan.

- Sveiggini í føroyskum búskapi kunnu vera stór, og vit sóu, at tað kann hava ov stóran váða við sær at binda ov stóran part av pensjónskapitalinum í Føroyum, segði Tummas Eliasen, stjóri í LÍV og í íløgufelagnum Royndini.




# Hvørjar uppgávur hevur íløgufelagið Royndin?

**Virksemið hjá Royndini er í stóran mun at gera íløgur í partabrøv og møguliga sum ábyrgdarpeningur í føroyskum feløgum, sum ikki eru skrásett á einum virðisbrævamarknaði**

ROYNDIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Lívstrygging setti í oktober 2005 á stovn íløgufelagið P/F Royndina. Endamálið við felagnum er sum framtaksfelag at gera íløgur í vinnuvirksemi. Fyri at hava so lítlar rakstrarútreiðslurnar, sum til ber, er raksturin av íløgufelagnum samskipaður við raksturin hjá Føroya Lívstrygging.

Royndin er soleiðis stovnað sum ein partur av langtíðaríløguætlanini hjá LÍV.

Eins og hjá flest øllum eftirlønarfeløgum er størsti parturin av íløgunum hjá LÍV í lánsbrøvum. Tó verða eisini íløgur gjørdar í partabrøv.

Íløgurnar í partabrøv hava seinastu árini verið um 5% av samlaðu íløgunum, men í 2005 øktist íløgurnar í partabrøv nakað, og umleið 8-10% ella einar 180 miljónir krónur av samlaðu íløgunum við ársenda 2005 vóru í partabrøvum. Hetta snýr seg her um altjóða partabrøv, sum øll eru skrásett á virðisbrævamarknaðum, og sum tí eru lætt umsetilig og hava neyva virðisáseting.

Virksemið hjá Royndini er í stóran mun at gera íløgur í partabrøv og møguliga sum ábyrgdarpeningur í føroyskum feløgum, sum ikki eru skrásett á einum virðisbrævamarknaði.

Orsøkin til, at hesin parturin av íløguvirkseminum hjá Føroya Lívstrygging er lagdur í eitt sjálvstøðugt felag er, at tá fæst ein greiðari skilnaður millum virksemið hjá Føroya Lívstrygging og virksemið hjá íløgufelagnum Royndini.